Ár 2009, hin 29. apríl

35.
Val til nevnd

Veljast skal ein limur og ein tiltakslimur í stýrið fyri Norðoya Røktarheim. Talan er um tann 6. limin, sum fellur til kommununa vegna samanlegging við Svínoyar kommunu. Sí skriv, dagf. 23.04.09.

Býráðsins samtykt: Málið útsett

36.
2004-10-005 N. Fornminnasavn – ynskja leigusáttmála við Kl. Kommunu

Lendið undir N. Forminnasavni er nú matrikulerað og fingið matr. nr. 163aa. Kl. Kommuna eigur undirlendið, men higartil hevur ongin leigusáttmáli verið millum partarnar. Av tí, at Fornminnasavnið hevur byggiloyvi til ein niðurtiknan skúr í norðara enda, mælir T.U. til:
- at langtíðar leigusáttmáli verður gjørdur partanna millum um matr. nr. 163aa

- at matr. nr. 163aa verður víðkað til eisini at
umfata lendið undir skúrinum, tá hesin er uppafturbygdur. Sí skriv frá T.U.

Havnanevndin tekur undir við tilmæli frá T.U., dagf. 07.04.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

37.
09/00013 Vantandi landsjáttan til rakstur av Dagtilhaldinum

Víst verður til samtyktina í býráðnum tann 24. febr. 2009, har avgjørt varð at flyta játtanina frá útbyggingini av Dagtilhaldin-um til raksturin av virkseminum í Dagtilhaldinum. Sambært roknskaparreglunum, skal málið leggjast fyri Býráðið og samtykkjast 2 ferðir.

Sosiala nevnd tekur undir við 1. viðgerð frá 16. febr. 09.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu nevnd 15.04.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt aðru ferð

38.
09/00034 Havnanevndin broytast til Havna- og Vinnunevndin

Hetta málið skal 2 ferðir fyri í Býráðnum.

Fíggjarnevndin samtykti seinnu ferð at taka undir við broyting-ini, sum vórðu fyrru ferð samtyktar av Býráðnum 24.03.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt aðru ferð

39.
09/00278 Nýggir søluprísir – Grótbrotið

Vísandi til viðlagda uppskot til nýggjar prísir fyri tilfar úr kommunala grótbrotinum á Strond, verður hervið mælt til at taka undir við dagførdum prísum, sum leiðarin fyri Grótbrotið mælir til. Sí skriv frá umsitingini.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum frá T.U., dagf. 08.04.09.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 14.04.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

40.
09/00286 Gjald fyri brúksvatn

Sí yvirlit frá T.U.

Tekniska nevnd er samd um, at vatngjald skal ásetast. Brúkar-arnir verða býttir í 4 bólkar:

1 Stórir brúkarar
2 Partafeløg, Sp/f, ið hava virksemi á landi
3 Firma við staðfestum virksemi (matr.)
4 Almennir og kommunalir stovnar og peningastovnar

Umsitingin ger eitt uppskot til gjøld og sendir hetta út til limir-nar til góðkenningar.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 14.04.09.

Sí nýtt yvirlit í málinum, dagf. 23. 04.09.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

41.
Ársroknskapur 2008 – Býráðið

Fíggjarnevndin mælir Býráðnum til at samtykkja ársroknskapin fyri 2008 við tilhoyrandi grannskoðanarprotokoll.

Býráðsins samtykt: Tilmælið samtykt

42.
09/00166 Endurskoðan av fíggjarætlan fyri 2009 – Býráðið

Havnanevndin tekur undir við dagførdari fíggjarætlan, dagf. 04.04.09.

Tekniska nevnd tekur undir við dagførdari fíggjarætlan, dagf. 04.04.09.

Sosiala nevnd tekur undir við uppskotinum til endurskoðan av fíggjarætlanini 2009.

Mentanarnevndin tekur undir við dagførdari fíggjarætlan, dagf. 04.04.2009.

Málið hevur verið til kunning í Ferðslunevndini.

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við uppskotinum.

Heilsu- og umhvørvisnevndin tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti í Fíggjarnevndini, Steinbjørn O. Jacobsen og Eyðgunn Samuelsen, tekur undir við endurskoðaðu fíggjar- ætlanaruppskotinum, dagf. 04.04.09, tó við fylgjandi broytingum:

Kalsoyarnæmingar + 50 tkr
Vevskúlin + 10 tkr
Tónlistaskúlin + 100 tkr
Bókasavnið + 50 tkr
Atlantis + 100 tkr
Býarfríðkan + 150 tkr
Frítíðarskúlin + 150 tkr
Dagtilhaldið + 50 tkr
Gøtusóping + 40 tkr
Í alt + 700 tkr

Minnilutin mælir til, at nevndu økingar av játtanunum í mun til fyriliggjandi uppskot verða í fyrsta lagi fíggjaðar við at skerja avdráttir av lánum við 700 tkr., og í øðrum lagi, at hetta verður fíggjað við at hækka inntøkurnar við 700 tkr.

Ein meiriluti í nevndini, Gunvá við Keldu, Jógvan Skorheim og Auðunn Konráðsson, tekur undir við endurskoðaðu fíggjarætl-anaruppskotinum, dagf. 04.04.09, vísandi til tilmæli frá HaN 14.04.09, TN 14.04.09, SoN 15,04,09, Men 15.04.09, FeN 16.04.09, BBN 16.04.09 og HeiN 16.04.09.

Býráðsins samtykt: Broytingaruppskot frá minilutanum, um at beina málið aftur í nevnd, fall við 5 atkv. fyri (EyS, JNM, ÓK, SOJ og JSkoradal) og 6 atkv. ímóti.

Tilmælið frá minnilutanum í FíN fall við 5 atkv. fyri (EyS, JNM, ÓK, SOJ og JSkoradal) og 6 atkv. ímóti.

Broytingaruppskot frá meirilutanum, dagfest 29/4-09, varð samtykt við 6 atkv. fyri (GvK, ASJ, JSkorheim, ÓML, EGH og AK) og 5 atkv. ímóti.